# Kerr hjálpir Írlandi

Føroyski landsliðsvenjarin Brian Kerr skal nú hjálpa Írlandi til HM-endaspælið. Írland skal spæla tveir sonevndar playoff dystir ímóti Fraklandi, og Brian Kerr skal nú geva írska landsliðsvenjaranum upplýsingar um franska landsliðið, sum Føroyar hava spælt tveir dystir ímóti seinasta árið.- Eg ætli mær at tosa við teir starvsfelagar, sum hava vitan um franska landsliðið, sigur Givoanni Trapattoni, sum er landsliðsvenjari hjá Írlandi - og tað sigur hann við blaðið Herald.



# Finnur í Svøríki

Toppskjúttin í føroysku kappingini og ársins stjørnuskot er í løtuni í Svøríki, har hann venur hjá Gefle, sum spælir í bestu deildini. Dimmalætting skrivar, at tað er Hans Jacob á Líknargøtu, umboðsmaður, sum hevur fingið royndarvenjingina í lag. Ikki óvæntað eru tað mongu málini her í Føroyum, sum hava gjørt Finn serstakliga áhugaverdan hjá svenska felagnum, sigur umboðsmaðurin við Dimmalætting.



Síðani hann í 1994 spældi sín fyrsta dyst fyri besta liðið hjá Real Madrid, hevur Raul havt kongastatus í kongliga spanska stórfelagnum

Mynd: Polfoto/AP

## Real Madrid tapti, men Raul skrivaði sær enn eitt kapittul í fótbóltssøguni, tá hann javnaði málmetið hjá týska Gerd Muller




Jákup Mørk

Hann hevur spælt 712 dystir fyri Real Madrid, og tað hevur eingin annar spælari gjørt. Hann hevur skorað 321 mál fyri felagið, og tað hevur heldur eingin annar gjørt. Og heldur ikki er nakar í nær námind teimum 226 málunum, sum hann hevur skotið í liguni. Hann er yngsti spælarin, sum nakran tíð hevur spælt við besta liðnum hjá Madrid. Við 44 málum eigur hann eisini málmetið á spanska landsliðnum. Seks meistaraheiti og trý Champions League-heiti hevur hann verið við til at vunnið, og eingin annar í Europa hevur spælt eins nógv ella skorað eins nógv sum hann í Champions League.

Mikukvøldið var Raul við í 3-2 tapinum hjá Real Madrid móti AC Milan, og tað í sjálvum sær var sjálvandi ikki júst tað, sum spælarin sjálvur ætlaði. Men við málinum til 1-0 kom hann upp á 66 mál í Europa, og tað er tað sama, sum meira enn 30 ára gamla metið hjá Gerd Muller.

32 ára gamli Raul González Blanco er metmaðurin fram um allar í sponskum fótbólti, og enn tykist hann ikki hava ætlanir um at steðga.

Síðani hann í 1992 skifti frá Atlético Madrid, har ungdómsvenjararnir ikki hildu talentið vera somikið stórt, at hann skuldi bindast við sáttmála, hevur hann verið stjørnubarn og fótbóltsgudur í Real Madrid. Fyrstu dystirnir í vaksnamannafótbólti spældi hann við C-liðnum hjá Real Madrid, men 17 mál í 9 dystum vóru nóg mikið hjá táverandi venjaranum, Jorge Valdano, sum tók blaðunga áleyparan upp á besta liðið. Longu í næsta dystinum skoraði hann sítt fyrsta mál, tá Michael Laudrup sendi innfyri úr høgru í grannauppgerðini móti Atlético, og síðani hevur hann verið yndisbarnið hjá áksoðarunum. Nakað sum seinni fekk koleriska Atlético-forsetan, Jesus Gil y Gil at uppsiga allar ungdómsvenjararnar í felagnum.

Og so kunnu vit til stuttleika leggja afturat, at fótbólturin eisini ger um seg tann partin av lívinum hjá Raul, tá hann ikki er á fótbóltsvøllinum.

Saman við sponsku supermodellini, Mamen Sanz, hevur hann fýra dreingir, meðan fimta barnið er ávegis. Og teir fýra eru allir uppkallaðir eftir kendum fótbóltsspælarum. Teir eru Jorge (eftir Jorge Valdano), Hugo (eftir Hugo Sanchez) Héctor (eftir Héctor Rial), Mateo (eftir Lothar Matthaus).

# Pato fekk Madrid at tiga

### Stóra úrslitið í gjárkvøldið kom á Santiago Bernabeu í Madrid, har Alexander Pato við tveimum málum fekk heimaáskoðararnar at tagna

Tað var uppgerðin millum teir báðar størstu risarnar í europiskum fótbólti. Real Madrid móti AC Milan. Kaká móti sínum fyrrverandi liðfeløgum. Sponsku europameistararnir móti italsku heimsmeistarunum.

Fasettirnar vóru nógvar og stórar, men fyrstu trý korterini av dystinum var ikki nakað, sum skapti tann heilt øgiliga spenningin.

Real Madrid var betra liðið, og tað var eisini fult uppiborið, tá Raul kundi gera sær dælt av stórum málmansmistaki hjá Dida, soleiðis at hann kundi skjóta Real Madrid framum.

Dida var tó ikki einasti málverjin, sum framdi mistøk á degnum. Real Madrid tóktist annars hava tamarhald á tí allarmesta, tá Pirlo royndi eydnuna úr 30 metrum. Canizares, sum annars verður roknaður millum teir allar bestu í heiminum, var als ikki til reiðar, og so smoygdi bólturin sær innum. Og heldur ikki var spanski landsliðsmálverjin ósekur, tá Pato økti til 2-1.

Real Madrid tóktist bjarga nakað av stoltleikanum, tá Drenthe javnaði eftir hornaspark, men aftur fekk Pato seinasta orðið. Fyrrverandi Real Madrid-spælarin, Clarence Seedorf, sendi innfyri, og við handara stólpa stóð Pato og sendi í kassan.

Aðrastaðni í Europa mest sum vissaðu Manchester United og Chelsea sær víðari luttøku í kappingini. United vann 1-0 á útivølli móti CSKA Moskva, og í London hevði Atlético Madrid ikki størvegis møguleika móti væl upplagda Chelsea, sum vann heili 4-0.

**-mørk**

### Úrslitini í gjárkvøldið

**Bólkur A**
Bordeaux-Bayern München 2-1
Juventus-Maccabi Haifa 1-0

**Bólkur B**
CSKA Moskva-Manchester United 0-1
Wolfsburg-Besiktas 0-0

**Bólkur C**
FC Zürich-Marseille 0-1
Real Madrid-AC Milan 2-3

**Bólkur D**
Chelsea-Atlético Madrid 4-0
Porto-Apoel Nicosia 2-1